**Mentamálastýrið**
*Fólkaskúladeildin*

# Skúlastjórastarv í Argja Skúla

Starvið sum skúlastjóri í Argja Skúla verður lýst til setanar frá 1. august 2001.

Skúlaárið 2001/2002 verða 348 næmingar í 10 árgangum í skúlanum. 28 lærarar starvast í skúlanum.

**Søkt verður eftir skúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av virksemi skúlans
- skal sýna leiðslumyndugleika og -hegni
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er kveikjandi í sínum skúlahugsanum
- á fólkaræðisligum støði skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum næmingar, lærarar og onnur samstarvsfólk
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum.

**Harumframt skal skúlastjórin**
- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, tolsemi og gott samarbeiði millum heim og skúla
- vera førur fyri at loysa møguligar trupulleikar
- vera førur fyri at røkja og menna starvsfólkasamstarvið
- skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd
- leggja dent á menning av skúlaskapinum í kommununi
- eggja næmingum, foreldrum og lærarum til at leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið eru undir Mentamálastýrinum/í Streymoyar skúladømi III við fyribils tænastu í Argja Skúla og tann, ið sett/-ur verður, eigur at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Starvið verður lønt í 34. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/-ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Mentamálstýrinum, skal vera Mentamálstýrinum í hendi **í seinasta lagi 21. mars 2001** og skal sendast til:

**Mentamálastýrið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279 · 110 Tórshavn
Telefon 355050 · Fax 355055
e-postur: MMS@MMS.fo

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

# Almenn móttøka

Í sambandi við at nýggjur leiðari tekur við á Norðoya Kunningarstovu, verður almenn móttøka í hølunum hjá Kunningarstovuni í niðastu hædd í býráðshúsunum í Klaksvík.

Móttøkan verður

**hósdagin 1. mars**
**frá kl. 16.00 til 18.00.**

**Norðoya Kunningarstova**

**Internet Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**

**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*
**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*
**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*
ADC
**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

# Foreldrabólkur skipar fyri fundi

Nýstovnaður foreldrabólkur hevur ætlanir um at møtast av og á, og møguliga skipa fyri onkrum tiltaki.

Á hesum fundi hava foreldur at deyvum og tunghoyrdum børnum høvi at tosa saman um felags áhugamál. Somu møguleikar hava deyv/tunghoyrd foreldur at hoyrandi børnum.

**Vit møtast í Deyvahúsinum, Íslandsvegur 10 B, 3. mars kl. 14.30.**

*Hjartaliga vælkomin!*

# Pedagogur søkist

Undir Almanna- og Heilsumálastýrinum og stovnum undir tí, við fyribils tænastu í Sambýlinum í Pætursgøtu 3 er eitt starv sum pedagogur leyst til setan 01.04.2001.

Sambýlið læt upp fyri einum ári síðan og er ætlanin at 5 fólk við Aspergers syndrom, sum er eitt slag av autismu, skulu búgva har.

Sum nú er, búgva bert tveir ungir menn í húsinum, men væntandi verður húsið fult í næstu framtíð.
Arbeiðið kemur í stóran mun at fevna um at menna búfólkini sosialt, tí hetta er ein stórur trupulleiki hjá fólki við Asbergers syndrom.

Tað er ein fyrimunur at hava vitan um autismu og serliga arbeiðsháttin, ið krevst til hetta brekið.
Arbeiðstíðirnar fevna um morgun-, kvøld- og náttarvaktir.

Starvið er tænastumannastarv sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið, lønt í lønarflokki 11/17 + viðbót.

Nærri fæst at vita um starvið frá fyristøðufólkinum á tlf. 319270 ella 316422.
Umsóknarfreistin er 12.03.2001 og skulu umsóknir saman við prógvi, viðmælum v.m. sendast til:

**Sambýlið**
Pætursgøta 3
FO-100 Tórshavn
Att.: fyristøðufólkið

**Sosialurin**
**www.sosialurin.fo**

# Pedagogur

Undir Almanna- og Heilsumálastýrinum og stovnum undir tí, við fyribils tænastu í Sambýlinum Undir Gráasteini 4 er eitt starv sum pedagogur leyst at søkja til setan 01.04.2001.

Í sambýlinum búgva 5 autistiskir menn.
Tað er ein fyrimunur at hava vitan um autismu og serliga arbeiðsháttin, ið krevst til hetta brekið.
Ítróttur er ein týdningarmikil partur av arbeiðnum, m.a. renning og svimjing, og tí krevst, at umsøkjarin er væl fyri kropsliga.

Arbeiðstíðirnar fevna um morgun-, kvøld- og náttarvaktir.

Starvið er tænastumannastarv sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið, lønt í lønarflokki 11/17 + viðbót.

Nærri fæst at vita um starvið frá fyristøðufólkinum á tlf. 319270.
Umsóknarfreistin er 01.02.2001 og skulu umsóknir saman við prógvi, viðmælum v.m. sendast til:

**Sambýlið Undir Gráasteini 4**
FO-100 Tórshavn
Att.: fyristøðufólkið



**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Maskinmeistari

Starv sum maskinmeistari á Teknisku deild er leyst at søkja til setan 1. apríl 2001 ella eftir avtalu.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum:**
- rakstur og viðlíkahald av tekniskari útgerð og innleggingum
- leiðsla av tekniska starvsfólkinum á maskinverkstaðnum.

**Krøv til umsøkjaran:**
- full maskinmeistaraútbúgving
- helst hava møguleika fyri at fáa góðkenning sum el-innleggjari
- hava førleika og áhuga í edv, ikki minst edv-grundaðar stýringar
- hava hug og evnir at leiða og menna deildina
- verða fúsur til egna fakliga menning og eftirútbúgving
- góð samstarvsevni
- verða sjálvstøðugur og kreativur

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt, fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu (introduktión)

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Maskinmeistarafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Suna Rasmussen, tekniskan leiðara, telefon 31 35 40, lokal 270.

Umsóknarfreistin er 14. mars 2001 kl. 12.00

Skrivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

# Grannastevna

Lýst verður til grannastevnu í bygdarhúsinum á Strondum mánadagin 5. mars 2001, kl. 19.00.

**Skrá:**
Innlagt mál um innangarðs útskifting av bygdini.

**Sjóvar Kommuna**

# Grannastevna

Lýst verður til grannastevnu í missiónshúsinum á Selatrað mikudagin 7. mars 2001, kl. 19.00.

**Skrá:**
Viðarlundin o.a.

**Sjóvar Kommuna**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Arbeiðsfólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir arbeiðsfólki til vegdeildina hjá teknisku deild.

**Arbeiðsfólk til asfaltarbeiði**
Søkt verður eftir arbeiðsfólki til vegdeildina hjá Tórshavnar kommunu at luttaka í asfaltarbeiði. Talan er um tíðaravmarkað starv frá miðan apríl til desember 2001.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Snarskivuna á tlf. 31 51 60.

**Arbeiðsfólk til kantsteinsarbeiði**
Søkt verður eftir arbeiðsfólki til vegdeildina hjá Tórshavnar kommunu til kantsteinsarbeiði at byrja skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Snarskivuna á tlf. 31 51 60.

SNARSKIVAN




# Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi at starvast 30 til 35 tímar um vikuna frá 01.04.2001 ella eftir avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið, lønt í lønarflokki 11/13. Harafturat verður veitt ein ikki eftirløngevandi viðbót.

Vøggustovan er ein sjálvsognarstovnur við 33 børnum í aldrinum 1 til 3 ár.

Umsókn við avriti av prógvi og møgulig viðmæli skal vera okkum í hendi í seinast 19.03.2001.

Meira fæst at vita við at venda sær til leiðaran ella Lauru á telefon 313131.

**Vøggustovan á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B
FO-100 Tórshavn

Hava tit onki hoyrt frá okkum áðrenn 26.03.2001 er starvið sett til annan umsøkjara.

Sosialurin -har tað hendir

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Starvsfólk til teknisku deild

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir fólki til teknisku deild at arbeiða við skráseting av leiðingum v.m.

**Starvið**
fevnir um skráseting av m.a. kloakkleiðingum, vatnleiðingum og gøtuljósum, vegum, húsanummurum í TLS-skipanini, sum er ein partur av eini landsumfatandi digital kortskipan (FDS).

**Førleikakrøv**
Alt skrásetingararbeiðið verður gjørt við Microstation GeoGraphics, og tí skal umsøkjarin hava kunnleika til Microstation ella GeoOutlook.

Kunnleiki til Microsoft Office pakkan er ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Føroya landsstýri og avvarðandi yrkisfelag.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Marius Müller, tekniska stjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 17. mars 2001. Viðmerk á umsóknina "Starv á teknisku deild".

SNARSKIVAN

# Longur opið á Kommunalu Brennistøðini

Endamálið við at hava opið longur, er at lættari skal verða at sleppa av við burturkast.

Jarn frá vinnuvirkjum og bilvrak verður ikki móttikið leygardag.

**Opið er hvønn leygardag frá kl. 13.00-17.00.**

Umframt er opið:
mánadag, mikudag og fríggjadag: **kl. 08.00-17.00**
týsdag og hósdag: **kl. 08.00-20.00**

Tórshavnar kommuna

Kommunala Brennistøðin